# Mathøgguslokkur

Mathøgguslokkur, *Loligo forbesi*, er ávísar árstíðir at fáa í kantinum á Føroyabanka, serliga í eystara kanti. Hesin høgguslokkur hevur vanliga góðan prís, millum 20 og 30 kr/kg.

Royndir eftir mathøgguslokki hava verið gjørdar í fleiri ár, tó ikki hvørt ár. Hesar royndir vísa, at árini eru ójøvn til fiskiskap. Tveir túrar vórðu gjørdir í november og desember 2004 (Mynd 1). Veiðan var hampilig í november, 6,1 tons í 11 hálum, men vánalig í desember, 3,2 tons í 16 hálum.

Prísurin á høgguslokkinum tann fyrra túrin var 21,60 kr/kg netto og tann seinna 22,66 kr/kg.

Ein trupulleiki við fiskiskapinum er, at høgguslokkurin ikki fæst við einum vanligum trolposa, sum er 135 ella 145 mm, tí høgguslokkurin tá fer út ígjøgnum meskarnar. Neyðugt er tí at hava smærri meskar. Tá smærri meskar verða nýttir, er altíð vandi fyri, at meira av óynsktari hjáveiðu kemur í saman við veiðuni. Tí verður skiljirist nýtt í trolinum, soleiðis at sleppast kann av við ein stóran part av tí óynsktu hjáveiðuni.

Royndirnar higartil hava víst, at í kantinum á Føroyabanka heldur høgguslokkur bert til á tveimum økjum, í eystara og í sunnara kanti. Ímillum hesi øki er einki at fáa og heldur ikki í norðara og vestara kanti.

Sum tað sæst á Mynd 2 eru hesi øki ikki stór. Hvørt øki er eitt stutt tóv til longdar, umleið 15 fj. Breiddin á økinum er umleið 1-2 fj.

Besta árstíðin til fiskiskap letur til at vera frá oktober til januar.

Í 1970unum veiddu skotar upp í 200 tons av mathøgguslokki um árið á Føroyabanka, men tá var allur Bankin opin fyri trolveiðu, so økið hjá teimum hevur verið munandi størri.



KRISTIAN ZACHARIASSEN
BIOLOGASSISTENTUR




*Mynd 1. Myndin vísir, hvar roynt varð í nov. – des. 2004.*




*Mynd 2. Økini, har høgguslokkur er at fáa við troli.*